


# Heilsa, Trygd og Umhvørvi - HTU

**Útbúgvingarskrá í 5 modulum.**

**Modul 2:** Leiðsla og stýring av Heilsu, Trygd og Umhvørvi í oljuvirkseminum

Endamálið við skeiðinum er at geva luttakarunum innlit í mest týðandi partarnar av leiðslu og stýring av heilsu, trygd og umhvørvi í kolvetnisvinnuni. Nomið verður við samspælið ímillum krøvini, sum myndugleikar seta til HTU og eginkrøvini, ið oljufeløgini seta, og hvussu hesi krøv eisini gerast galdandi fyri veitararnar hjá oljufeløgunum.

Skeiðið er skipað í samstarvi millum Føroya Handilsskúla og Handilsskúlan BI í Stavanger.

**Innihald:**
- HTU- leiðsla í virkishøpi
- HTU- leiðsla og heildargóðska
- HTU- í samband við fyriskipanarligar broytingar
- HTU- amboð og -hættir
- HTU- mátingar og -eftirmetingar

**Dagar:** 18.,19.,20. og 21. apríl 2001. Allar dagar: kl. 09.00-16.45
**Skeiðleiðari:** Bjarne Arvidsen
**Kostnaður:** 2.000,00 kr. fyri hvønn, íroknað frálæru, tilfar og mat.
**Tilmelding:** Í seinasta lagi 11. apríl 2001

Skeiðið er ætlað øllum, ið ætla sær at starvast í frálandavinnuni og teimum í starvast í vinnum, ið ætla sær at veita tænastur til frálandavinnuna. ***Vert er at geva gætur, at eitt av 5 krøvum til virkir, sum ætla sær í oljuvinnuna, er at tey skulu hava eina skipan við atliti at heilsu, trygd og umhvørvi.***

SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH
Tel: 318813, Fax: 313374, T-postur: fh-sth@post.olivant.fo


# Starv í Føroya Skúlabókagrunni

Eitt starv í Føroya Skúlabókagrunni verður lýst til setanar sum skjótast og ikki seinni enn 1. august 2001.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um praktiskt útgávuvirksemi, ráðgeving og vegleiðing í sambandi við at geva út fjølbroyttar undirvísingarmiðlar til føroyska skúlaverkið. Ein partur í starvinum verður at kunna seg við tørv á tíðarbærum undirvísingarmiðlum, lærugreinum og undirvísingarevnum, eina helst í fólkaskúlanum, eisini í teld og teldutøkum útgávum. Upplæring kann verða neyðug.

Til starvið krevst útbúgving sum fólkaskúlalærari, í minsta lagi 5 ára undirvísingarroyndir, dyggur fakligur førleiki, hollur kunnleiki í føroyskum og kunnleiki í teld.

Løn og setanartreytir verða eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag og við góðkenning Fíggjarmálastýrisins. Royndartíðin er eitt ár.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera skúlabókanevndini í hendi ikki seinni enn 8. mai 2001. Gjølligari upplýsingar um starvið fáast frá skrivaranum í skúlabókanevndini, Heðini M. Klein, telefon 316100.

Tórshavn, 29. mars 2001

**Føroya Skúlabókagrunnur**
**Skúlabókanevndin**
Lützenstrød 4 · FO-100 Tórshavn
Telefon 316100




**Stóra bringu**
**-ella lítla?**
**Ert tú ein av teimum 80%, ið ganga í skeivari BH-stødd?**
**Støkk so inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa tær at finna júst tína stødd.**
Sosialurin · 311820
**Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm í ummáli, og frá AA til H skál.**
**Vit hava eisini korsilett í stórum støddum**
siri
liv & heilsa
Dr. Jacobsensgøta 18
100 Tórshavn
Tel./Fax 316610

Sosialurin -har tað hendir

PÁSKA TILBOÐ
Ahorn Plank II
Wicanders
Parkett
Ialt 19m²
bert 4.900,-
máling & gólv
Við Landavegin
Tórshavn • Tel. 31 60 66

DVEYLAN
Gólv- og vegg vask

· Vinyl
· Linolium
· Flísar
· Teppir
· Veggir
Tygum eru vælkomin at ringja og fáa eitt óbindandi tilboð.
J.C. Svabosgøta 50
100 Tórshavn
Tlf. 31 41 75

KIA
CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel
16 V, 126 HK, 5 hurðar

Rætti bilurin til mong endamál.
Pláss fyri 7 fólkum
og hópin av viðføri.
D. B. Bilar
Tel. 310 600

Lesið
Sosialurin
-tað loysir seg

KIA
CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel
16 V, 126 HK, 5 hurðar

Rætti bilurin til mong endamál.
Pláss fyri 7 fólkum
og hópin av viðføri.
D. B. Bilar
Tel. 310 600

Visti tú ikki tað?

BýIN
- HVøNN HóSDAG


# hygg & hoyr



Frá fríggjadegi 6. apríl til hósdagin 12. apríl

# Pernilles Univers




*Alt fleiri knýta kærleiksbond gjøgnum internetið. Tað er ein farin tíð, tá lýsingar um samband bara vóru frá einligum kvinnum, sum eru omanfyri tey fjøruti árini.*

*Í dag er tað stjórin, karrierukvinnan og hondverkarin, sum søkja samband gjøgnum internetið. Í Pernilles Univers verður hugt nærri at hesum fyribrigdinum, sum hevur tikið seg upp við internetinum seinasta árini.*

## Frímerki – ein góð søluvøra




## The Patriot




## Felicity




## Mumi




# Apríl- apríl!

*Marna Jakobsen ummælir:*



Fótbólturin hevur sett sín dám á flestu sendingar í útvarpinum. Undanfarnu viku var tað serliga landsliðið, sum setti sín dám á sendingarnar. Nú eru vit aftur farin at hóma verðinsmeistaraskapin fyri framman. Eg eri eisini glað um úrslitið, men eg kann ikki lata vera við at hugsa um tann velduga møguleika, tað má vera hjá tíðindafólki at sleppa til Moskva, og so ikki at brúka hann til at greiða okkum eitt sindur frá, hvussu har er. Ok, vit fingu at vita, at gistingarhúsið, sum fótbóltsfólkið var á, var øgiliga stórt, og tað tók langa tíð at kjekka inn, og at alt gekk so seint, og at man skal gjalda seg burtur úr øllum, men eg hugsaði nú meira um, at stuttligt hevði verið at fingið nakrar løtumyndir úr Moskva, sum ikki høvdu við fótbólt at gera. Møguleikin var til staðar, tí tey høvdu tolk, sum tosaði flótandi føroyskt, men tað kanska kemur okkurt seinni.

Føroyar hava ongan uttanríkispolitikk, tí tað ornar Danmark fyri okkum, men tað forðar so ikki Fólkaflokkinum at reka eitt slag av uttanríkispolitiskum virksemi. Óli Breckmann hevur gjørt seg sjálvan til talsmann fyri Føroya fólki. Maðurin hevur gudhjálpi okkum skrivað bræv til Ariel Sharon og sagt, hvussu keddur hann er av, at ísraelsfólk ikki sleppur at hava tað lovaða landið í frið, og tað er ikki nóg mikið at siga, hvat hann og Fólkaflokkurin meina, men hann hevur haraftrat greitt Sharon frá, at næstan alt Føroya fólk hevur somu áskoðanir sum Óli Breckmann.

Nú veit eg hvørja áskoðan føroyski Fólkaflokkurin hevur og at døma eftir, hvussu føroyski tíðindaheimurin viðger ella rættari letur vera at viðgera kreppuna í Miðeystri, so er ikki løgið, at Óli Breckmann heldur at alt Føroya fólk tekur undir við honum.

Eg eri tó so tilkomin, at eg minnist, hvussu Óli Breckmann hálovaði rasistiska stýrinum í Suðurafrika og Pinochet í Chile, so tað undrar ikki meg, at hann eisini tekur undir við krígsgreðinginum Sharon. Eg vóni tó, at føroyingar brúka sítt vit og skil og hyggja at søguni hjá Miðeystri, heldur enn at brúka Gamla Testamentið sum áhaldsi at buka í høvdið á palestinarum. Føroyski tíðindaheimurin brúkar ikki nógva orku at lýsa sakina frá báðum síðum. Eg haldi ikki tað er nóg mikið, at vit í nærum hvørjari tíðindasending fáa at vita um ein steinkastandi palestina ella ein skjótandi ísraelitt, tað vera vit ikki klókari av.

Sum rosinan í pylsuendanum komu tíðindi frá Bjarna Djurholm í Vinnumálastýrinum um, at Ísrael skal vera bjargingin í føroyskari KT-vinnu. Tíanverri var hetta áðrenn 1. apríl, so hetta er, so ófatuligt tað ljóðar: sannleiki. Fólkaflokkurin rekur reinan provokatiónspolitikk í løtuni, og alt fer aftur við borðinum, havi bert sæð eittans lesarabræv, har skrivarin setur spurnartekin við ta áskoðan, ið kemur fram í skrivaðu fjølmiðlunum.

Ótrúligt at hugsa sær, at hóast ísraelsku búsetingarnar á palestinskum øki eru í stríð við fólkarættin, Genevesáttmálan og ST-samtyktir, so tora vit ikki at taka hetta uppá tungu, tí set nú fyri, at onkur fer at kalla okkum jødahatarar. Eg havi eitt uppskot til Armgarð Arge: ger eina sending um Ísmael, um hann segði Gud við Hágar: "Far og tak sveinin upp og hav hann í góðari varðveitslu, tí eg skal gera hann til mikla tjóð".

Men lat okkum ikki ov leingi dvølja við sorg og trega, men hugna okkum við einari av teimum túsundvís av tónleikasendingunum, ið eru at hoyra í Útvarpi Føroya. Her var serliga ein, sum eg lurtaði eftir, tað var tann hjá Hans Egholm mánakvøldið, sum eitur Tónasláttur. Sendingin kundi saktans havt eitt framhald, mær dámdi væl at vera sett aftur í tíðina, tá ið eg var ung, tað er jú mangan ein rúsandi kensla.

Vit vórðu so dyggiligа send apríl í Basalt mánakvøldið, tað hava tey flestu funnið útav nú. Eg fekk tíanverri ikki við, um útvarpið sendi okkum apríl, har havi eg hoyrt so nógv undarlig tíðindi hesa seinastu vikuna, at eg haldi meg vera senda apríl í heilum.